## Rooney í ónáðir

Manchester United-venjarin, Alex Ferguson, sigur, at Wayne Rooney sjálvur hevur skyldina av, at hann er skaddur. Ferguson er ikki nøgdur við, at Rooney spældi meginpartin av venjingardystinum móti Egyptalandi, tí hann hevði ein minni skaða í knænum. Hóast skaðan, so spardi 24 ára gamli framherjin seg ikki, og tí gjørdist skaðin bara verri.




## Óbroytt í Italia

Oddabrakið í Seria A um vikuskiftið var millum AS Roma og AC Milan. Liðini elta Inter, sum í síðstuni hevur spælt fleiri javnleikir. Men hvørki Roma ella Milan megnaðu at skora. Inter tók á heimavølli móti Genoa, og heldur ikki í tí dystinum kom nakað mál. Inter er framvegis fýra stig framman fyri Milan, meðan Roma er á triðja plássi, sjey stig aftanfyri Inter.

### KÍF-StÍF 18-28 (8-15):

# Strandingar vunnu stórt

**Kollfirðingar fingu ongantíð fatur í longra endanum, tá strandingar vitjaðu í gjár. Í staðin gjørdist úrslitið ein knúsandi StÍF-sigur**




Hilmar Jan Hansen



**Strandingar vóru væl fyrireikaðir og lótu ikki kollfirðingar sleppa at stýra dystinum, sum eisini endaði við StÍF-sigri og 10 málum á muni**

Mynd: Álvur Haraldsen

Tá KÍF tíðliga í kappingini einki fekk burturúr, stimaði StÍF avstað, men brátt vóru leiklutirnir umbýttir. Brádliga stóð fast hjá StÍF, ið ikki vann í mánaðir, meðan KÍF byrjaði at fáa stig og sigrar – ikki minst ímóti teimum liðunum, tey fægstu væntaðu tað.

Men dysturin í Kollafirði í gjár kundi fyri tað verið spældur í fyrsta landskappingarumfarinum, tí StÍF var so ruddiliga omaná, meðan KÍF einki formáddi sær. Longu beinanvegin sást, at kollfirðingar ikki fingu verjuna at rigga, og tí spurdist heldur einki burtur úr álopsspælinum.

Ein onnur orsøk til, at KÍF ikki fekk nakað burtur úr sínum álopum og skotroyndum, var málverjin hjá StÍF, Marian Cirluganescu, ið mestsum tók alt, hann fekk ímóti sær av skotum, umframt at hann hevði eina sterka verju framman fyri sær. Hann var ein livandi múrur og helst fremsta orsøkin til, at sjálvsálitið hjá kollfirðingum varð pilkað sundur.

### Ráðaleysir

Strandingar høvdu toppskjúttan hjá sær, Cristian Preda, sitandi uttanfyri í gjár, og tað hevði kanska sítt at siga fyri spælið hjá StÍF. Kollfirðingar høvdu óivað gjørt seg út uppá, at honum skuldu teir ansa serliga væl eftir, men tá hann slett ikki spældi, tóktust teir ikki sørt ráðaleysir.

Samstundis spílaðu hinir á StÍF-liðnum seg bara enn meira út, so tí gjørdist skjótt greitt, hvønn veg tað bar í hesum dystinum. Eisini høvdu teir í StÍF lisið væl uppá, tí hvørja ferð KÍF royndi at seta ferðina upp og fáa gongd á sítt skjóta spæl, hálaðu strandingar stikkið úr og vístu, at teir ikki lótu seg lumpa.

Longu í hálvleikinum vóru sjey mál á muni, og í seinna hálvleiki økti StÍF spakuliga um leiðsluna, so talan altso gjørdist um ein sera tryggan – og ikki minni kærkomnan sigur – til strandingar, sum harvið smoygdu sær upp á triðjapláss, meðan KÍF dragnaði enn eina ferð og datt niður á fjórða plássið.

## FAKTA

**Neistin-Stjørnan 24-26 (12-15)**
**10 min:** 4-6
**20 min:** 8-11
**40 min:** 17-22
**50 min:** 19-24
**Málskjúttar**
**Neistin:** Katrin á Neystabø 8 (3), Anja Heinadóttir 4, Birita Wardum 4, Unn Kragesteen 3, Jacklin Duhuus 2, Marjun F. Danberg 2, Lina Andriulyte 1
**Stjørnan:** Valentina Suciou 7 (1), Joan Midjord Joensen 6, Simona Petersen 6 (1), Una Olsen 3, Durita Mikkelsen 1, Judith Hansen 1, Bára Skaale Klastein 1, Annika Ljósstein 1
**Brotskøst:** Neistin 5, Stjørnan 3
**Útvísingar:** Neistin 1, Stjørnan 3
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

### Neistin-Stjørnan 24-26 (12-15):

# Neistin var ov heitur

**Neistakvinnurnar høvdu allar møguleikar at taka eitt óvæntað stig frá Stjørnuni. Men í avgerandi løtunum vóru royndirnar á muni**




Jákup Mørk

Hóast tað fyri langari tíð síðani var greitt, at Neistin ikki kundi hótta Stjørnuna ella Tjaldur í finalukapprenningini, so hevur málið støðugt verið at tað í onkrum av dystunum móti báðum oddaliðunum skuldi eydnast at taka stig.

Og tað var um reppið, at hetta eydnaðist sunnudagin.

Fyrstu løtuna var annars ikki so nógv, sum bendi á, at Stjørnan skuldi fáa teir heilt stóru trupulleikarnir. Steypavinnararnir løgdu bragdliga fyri, og hóast verjan hjá vertunum riggaði hampuliga væl, so hekk álopsparturin ikki nóg væl saman.

Hetta broyttist tó nakað eftir steðgin. Neistin vann seg heilt nær Stjørnuni, men tá gestirnir aftur øktu ferðina, tóktist alt avgjørt. Neistin noktaði tó at geva seg, og tá Fríða Petersen í málinum fór at vísa, hví hon er sjálvskrivað í landsliðsmálinum, fór at sansa at hjá Stjørnuni.

Seinastu 10 minuttirnar eydnaðist bara tvær ferðir at finna málið hjá gestunum, og tað gav av álvara møguleikan til Neistan. Ikki minst tá Kristina Griksaite móti dystarenda fekk tveir fingrar frá dómaraparinum.

Tað eydnaðist tó ikki Neistanum at skora upp á brotskastið, og yvirtalsstøðan sum heild var heldur ikki nóg væl nýtt, og so slapp Stjørnan við skrekkinum, hóast tær sjónliga høvdu nervar hesa seinastu løtuna.

Tað vóru tær ikki einsamallar um, og so máttu tær í Neistanum bara ásanna, at tú skalt eisini tora at taka av, tá møguleikin er har.



**Eftir steðgin var Neistin um reppið at fáa Stjørnuna aftur. Verjan stríddist væl, og Fríða Petersen tók tað nógva av tí, sum slapp inn um verjuna**

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## FAKTA

**KÍF-StÍF 18-28 (8-15)**
**10 min:** 3-5
**20 min:** 5-11
**40 min:** 12-18
**50 min:** 13-23
**Málskjúttar**
**KÍF:** Teitur Joensen 4, Andrias Nielsen 4, Niklas Reginsson 4, Rógvi Weyhe 4, Regin Petersen 2
**StÍF:** Marius Joensen 8, Leivur Justinussen 7, Súni Ernstsson 3, Jóannes Prestá 3, Bárður Danielsen 2, Borgar Danielsen 2, Mortan Hansen 2, Jógvan Berg 1
**Útvísingar:** KÍF 4, StÍF 5
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen